# BØNARLØTAN

**OKTOBER** **2024** **39. árg.**

## *1. Týsdagur* *1. Mós.*




*Fólkið í Sorimi fingið Orð Guds á móðurmálinum*

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**

Nú hevur fólkið í Sorimi fingið Nýggja Testamenti á sínum egna móðurmáli. Føroyskar samkomur og einstaklingar hava stuðlað og biðið fyri hesum arbeiði, sum byrjaði í 1997. Vit hava 34 næmingar á bíbliuskúlanum og 16 í trúboðaravenjingini hetta skúlaárið umframt 11 sjálvboðin hjáparfólk á skúlanum. Biðið, at tey lesandi búnast andaliga, og at samkoman í Sorimi skal halda seg til Orð Guðs.

**KRINGVARPIÐ**
6. okt. kl. 17 útvarpsmøti, Zarepta

**EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á www.evr.fo)**
Sunnukv..........kl. 21...Kelduvaðið (endursent hósd. kl. 21)
Týskv............kl. 21....Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

## *2. Mikudagur* *Matt. 20.1-19*

### OM, LOGOS HOPE, TeenStreet




OM Føroyar skipar fyri missiónsskúla eitt kvøld um mánaðin. Fram til juni 2025 verður evnið Missiónin og bønin. 22. okt. undirvísir Jóhan Petur Johannesen kl. 19 í Skansahúsinum. Í jan. 2025 vitja Birita og John Timothy í Føroyum. Seinni flyta tey úr Sapporo til Nanae, ið liggur sunnari á oynni Hokkaido í Japan. Logos Hope er í Freetown í Sierra Leone allan mánaðin. Doulos Hope er í Puerto Princesa á Filipsoyggjum til 8. okt. og síðani í Cebu 14. okt. – 12. nov. Hjalmar Gregersen er á Reach missiónsskúlanum í Birmingham.

### PAPUA NÝGUNEA
### Lili og Brian Poulsen
### Elliot 8, Jude 6, Evelyn 4, Olivia 1

Herfyri fór Brian saman við tveimum starvsfelagum út til ættarbólk her í East New Britain, PNG, fyri at kunna um okkara trúboðanarvirksemi. Áhugin fyri trúboðarum var stórur. 28. sep. – 7.okt. fara vit enn eina kanningarferð og vitja hina helvtina av ættarbólkinum. Biðið um varðveitslu, gott samskifti um endamálið og opin hjørtu. Vit flyta skjótt út í ættarbólkin og biðja, at Gud leiðir. Lili undirvísir synum okkara heima.

### JAPAN
### Shino og Hallur Mortensen
### Kano 15, Nana 13, Louie 10, Rio 5

Í okt. fer Hallur til Myanmar at undirvísa á einum bíbliuskúla í tvær

vikur. Eisini verður vitjað í ymsum samkomum. Biðið um trygd, vísdóm og signing.

## *3. Hósdagur* *1. Mós. 49.1-15*



**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Ansa og Arnold Mortensen**
**Ewelina 14**
Nógvir gestir hava verið her gjøgnum summarið. Ungdómsarbeiðið er byrjað aftur. Biðið fyri samkomuni og sunnudagsskúlanum, og biðið um, at tey ungu koma við opnum hjørtum.

**ZAREPTA**
Heystlega 15-17 ár, 11-16. okt.

*Í dag fyllir Nana Mortensen 13 ár

## *4. Fríggjadagur* *Sálm. 13 og 14*

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**
Vit verða heima allan okt. Judy fekk nýggja mjødn, sum virkar væl, men fullur førleiki kemur væl seinni. Eg skal undirvísa í samkomuni her í Montgomery. Samstundis skal eg fyrireika meg til eina stevnu í Rumenia fyrst í nov., har eg skal tala fleiri ferðir umframt at luttaka í ymiskum tiltøkum á netinum. Judy rættlesur og gjøgnumgongur trý stór rit fyri nevndina hjá NTM. Hetta er stórarbeiði, ið tekur nógvar vikur.

**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**

**– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Josva 15, Ester 14, Samuel 10**
**– Dora og Niels Pauli Nónstein, Kristina 13**
**– Danjal og Synnøve av Rana, Anna Emilie 9, Lukas 4**

## *5. Leygardagur* *Matt. 20.20-34*

**DANMARK**
**Anna og Hans Djurhuus**
Føroyskt møti verður leygardagin 5. okt. kl. 19 í Bethaniakirkjuni, Dag Hammarskjøldsgade 2a í Aalborg. Biðið fyri møtinum, at fleiri koma, og fyri Orðinum, ið talað verður.

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**
Biðið fyri arbeiðnum í Calvary. Fleiri fólk eru løgd afturat síðan í summar. Útbyggingin gongur væl og verður helst liðug, tá ið tiltøkini í des. byrja, s.s. jólakonsertir.



**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

## *6. Sunnudagur* *1. Mós, 49.16-33*

**FØROYAR**
**Birgit og Svenning av Lofti**
Í dag luttaki eg á almennum bønartiltaki á Vaglinum í Havn, sum er fyri gíslarnar í Gaza og støðuni í Miðeystri. 11-18. okt. eri eg saman við øðrum føroyingum í Bømlo í Noregi, har vit vitja samkomur og hava møti úti og inni. 24-28. okt. havi eg bíbliundirvísing umborð á Norrönu í sambandi við bíbliuferð.

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**
Vit endurskoða Jóh. ev. og 2. Pæt. Báðar bøkurnar innihalda hugtøk, ið eru torfør at umseta.



**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Emma Grace 16, Jónatan 15,**
**Markus 12, Evita 9, Joy 7**

## *7. Mánadagur* — *Matt. 21.1-11*

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**
Í okt. savnast vit til fundir saman við samkomuleiðslum, sum hava trúboðaratoymi inni í ættarbólkunum, og við samkomuumboðum, ið stuðla á ymisan hátt. Vit gleðast um hesar samkomur, sum vísa stóra ábyrgd, og aðrar, sum hjálpa til.

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**
Cathy og eg verða í USA í okt. Í nov. hjálpa vit umsetarum á Filipsoyggjum. Vit verða helst aftur í Italia fyrst í des.

*Í dag fyllir Jónatan 15 ár

## *8. Týsdagur* — *1. Mós. 50.1-26*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**
Biðið fyri møtum, samtalum, STEVN og verkinum á alnetinum, at Harrin gevur okkum vísdóm og styrki. Minnist eisini Sáru, systur Shamilu, í Pakistan, at Harrin gevur styrki og opnar nýggjar dyr.

## *9. Mikudagur* *Matt. 21.12-22*

**OM, SUÐURAFRIKA, REACH**
**Tanja og Kurt Abrahams**
**Hanna 1**




Á Reach trúboðanarskúlanum eru nú 17 næmingar millum 17 og 44 ár. Lært verður um alt frá, hvør ið Gud er, um tabernaklið, til persónleikaeyðkenni. Fyri mong er tað avbjóðandi at búgva og arbeiða saman við fólkum úr ymiskum mentanum. Biðið fyri virkseminum og fyri næmingunum.

**DANMARK**
**Susan og Øssur Berghamar**

Vit vóru í Føroyum í tvær vikur í sept., og hóast vit ikki ferðaðust so nógv hesa ferð, so eru vit takksom fyri tað hjartalag og samfelag, ið vit merkja rundan um verkið í Kristnastovu og okkum við. Biðið, at tey ungu trúgvandi, sum júst eru farin undir eitt nýtt skúlaár, verða varðveitt í trúnni.

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Lydia 7**

## *10. Hósdagur* *Mika 6.1-16*

**FØROYAR**
**Vanja og Svein í Prestgarði**
**Terji 12, Petra 10**

Vóru í Søgne til tjaldmøtir, har blivu nøkur frelst og endurnýggjað. 10-20. okt. hava vit møtir í Vigeland og Bergen. Seinni verður evangelisk røð í Roynhøllini í Hvalba undir heitinum Heystið er komið.

**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**

**NTM – FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 13, Tabita 10, Debora 9, Natan 6**

## *11. Fríggjadagur* *Sálm. 15 og 16*

ATLANTIC MISSION
Biðið fyri evangeliseringsferðini til Bømlo í Noregi 11-18. okt. Møti verða í trimum støðum í oynni. Eisini verða útimøti, vitjan á eldraheimi og á eini kafe. Vit bera traktatir og innbjóðingar til húsini. Meira kunning fæst frá Ruth Gaardlykke, tel. 519090, atlanticmission@mail.fo.

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**

## *12. Leygardagur* *Matt. 21.23-32*

**ONGLAND, Birmingham, Personal Support Matters**
**Claire og Craig Niclasen**
**Rebekah 16, Lydia 14**



Claire heldur fyrilestur fyri fleiri trúboðarum úr ymiskum felagsskapum. Biðið, at luttakarar hava áræði at boða evangeliið í síni tænastu, at Harrin útvegar teimum stuðlar, og at navn Harrans verður lovað. Minnist Claire, nú hon hevur átikið sær eyka uppgávur fyri Mission Partners Network Forum.

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

## *13. Sunnudagur* *Mika 7.1-20*

**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**




Juvel II var á grønlandsferð 22. mai til 10. sept., og Harrin signaði ríkliga. Vit vitjaðu flestu bygdir og býir í Grønlandi, og evangeliið varð boðað um fría frelsu fyri øll, ið trúgva. Mong hava játtað trúgv á Jesus, og heilt mong vildu hava forbøn í sambandi við týðandi trupulleikar í lívinum. Biðið, at Harrin signar og varðveitir børn síni í Grønlandi.

## *14. Mánadagur* *Matt. 21.33-46*

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**



Tað eru 10 ár, síðan vit fyrst vóru í Uganda. Vit eru har frá 26. sept. og verða aftur í USA 20. nov. Vit skulu vitja 18 samkomur, ið Pastor Fred hevur stovnsett, og hann hevur biðið um hjálp at stovna hússamkomur. Daniel skal tala fyri herfólki og vitja eina bygd, har Fred og onnur á seinastu vitjanini nærum komu sera illa fyri.

**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**

## *15. Týsdagur* *Hos. 8.1-14*

**DANMARK, Glostrup Frikirke**
Í okkara lítlu samkomu koma fólk úr ymiskum londum og við ymiskum kirkjuligum bakgrundum. Biðið um gott samanhald, og at hirðaarbeiðið styrkist.

**FØROYAR**
**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**



## *16. Mikudagur* *Matt. 22.1-14*

**DANMARK, Kolding**
**Anne og Jan T. Zachariassen**
Deaf Bible Society hevur sett seg í samband við meg um møguleikan at týða nakað av tilfari til føroyskt teknmál. Jens Pauli í Dali og eg samskifta um hetta. Okkum tørvar leiðslu og vegleiðing.

## *17. Hósdagur* *Hos. 9.1-17*

**DANMARK, Kristnastova**
**Sólva og Jákup Hansen**
Biðið fyri árligu leguni, sum verður 17-20. okt. Hetta er seinasti mánaðurin, vit eru í tænastuni her. Biðið, at Harrin framhaldandi leiðir okkum eftir ætlan Síni!

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

## *18. Fríggjadagur* *Sálm. 17*

**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 12, Emma 8**

Biðið fyri La Fonte samkomuni, nú allar tænastur av álvara byrja aftur: barnaarbeiðið, ungdómsbólkurin, kvinnubólkurin, hjúnamøtini, humanitera arbeiðið, vikuligu bíbliutímarnir o.a.

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 11, Micah 11**

## *19. Leygardagur* *Matt. 22.15-22*

**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett (fjararb.)**



Stephen var við á bønartúri í Kapadokya í Miðturkalandi, har ongi trúgvandi hava verið seinastu 500 árini. Harrin hevur tó virkað, og nógv vóru opin fyri evangeliinum. Stephen hevði góðar samtalur við trý fólk. Tey vístu stóran blíðskap og vildu hava fleiri vitjanir. Vit eru nú fyribils í Onglandi fyri at vera nærri hjá familjuni og fara síðani at virka við felagsskapinum Frontiers við m.a. at fyrireika trúboðarar til tænastu uttanlands. Vit vitja tó framhaldandi í Turkalandi við toymum.

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**

*Í dag fyllir Ester Mikkelsen 14 ár

## 20. Sunnudagur — Hos. 10.1-15

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 3, Selah Rose 1**
Biðið, at Gud hjálpir okkum at læra mál og mentan skjótt og væl, eins og at gera okkum før fyri at menna góð sambond við heimafólkið. Asmat er sera avbyrgdur staður, so okkum tørvar eggjan og trivnað, eisini fyri at okkara ættleiðingartilgongd skal ganga væl.

*Í dag fyllir Abigail Mortensen 6 ár og Debora Christiansen 9 ár

## 21. Mánadagur — Matt. 22.23-33

**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 14, Leah 10, Abigail 6**



Biðið fyri samkomunum í Nantes og Orvault. Samkoman í Nantes telur yvir 190 fólk, og okkum tørvar nýggjar leiðarar og venjing til ymsar tænastur. Jóhannis hevur gjørt seks ára fulltíðarsáttmála við CAEF og samkomuna, har hann nú er partur av teimum elstu. *KidsClub* byrjar aftur fyri nýggja skúlaárið. Vit hava fýra møtir fram til des. fyri samkomustovnan og byrja eisini nýggjan bíbliulestrar- og bønarbólk í okkara nærøki.

## 22. Týsdagur — Hos. 11.1-11

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 12**

Vit broyta nakrar fyrisitingarligar tilgongdir at senda ung fólk út í Harrans tænastu. Biðið um vísdóm fyri hesum, so mannagongdir gerast virknari, og vit tæna Harranum á uppaftur betri hátt.



**ONGLAND,**
**European Christian Mission**
**Dorit og Simon Marshall**

*Í dag fyllir Sarah Mortensen 15 ár

## *23. Mikudagur* *Matt. 22.34-46*

**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 7, Timon 5, Manuel 0, Salome 0**

Hóast brunin er minkaður, so hevur Natalie fingið varandi mein í smærri blóðæðrar og hjartaklaffar. Læknarnir mæla tó bert til árligar kanningar, og ein ætlan verður gjørd fyri at styrkja mótstøðuførið hjá Natalie við ymsum kostískoyti. Takk fyri forbøn. Vit fara aftur til kovolfólkið síðst í okt.

## *24. Hósdagur* *Hos. 12.1-15*

**PAPUA NÝGUINEA, Goroka**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 16, Noah 15, Karis 11, Judah 9, Ethan 6**

Vit eru aftur í PNG. Minnist okkum og børnini, sum vit royna at falla til við bústaði, skúla og arbeiðsumhvørvi; at vit finna javnvág millum tørvin hjá børnunum og málini við missiónsarbeiðnum. Vit fjararbeiða, ferðast til tvær samkomur og flúgva ættarfólk út til okkara í Goroka í sambandi við umsetingarbeiðið. Eisini er málskeið.



*Í dag fyllir Natan Christiansen 6 ár

## *25. Fríggjadagur* — *Sálm. 18.1-25*



**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Arbeiðið við at greiða 2. Mós. til prent gongur væl. Nú skal hon prentast í Dakar. Ymiskt annað skal gerast, áðrenn eg fari aftur til Tongia. Biðið, at drúgvi koyritúrurin gongur væl. Bygdarfólkið sigur, at regntíðin hevur verið góð; biðið, at vit eisini fáa regn henda mánaðin, so tað, ið bleiv sátt seint, eisini búnast.

## *26. Leygardagur* — *Matt. 23.1-12*

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 15**

Vit bæði og Ryan komu til Dakar í august. Hann lesur á øðrum ári og trívist við skúla, vinum og ítrótti. Fleiri nýggir trúboðarar eru komnir til toymið. Hans Arni hevur eitt nú ábyrgd av uppihaldsviðurskiftum, og Marion er vegleiðari í máli og mentan. Vit leggja komandi árið til rættis. Biðið, at Harrin leiðir virksemið.

## *27. Sunnudagur* — *Hos. 13.1-15*

**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**

Eg havi verið í regluligum sambandi við starvsbrøður og aðrar í Kanada, sum royna at finna besta háttin at eggja til evangelisering. Tað er ein framíhjáræ ttur at arbeiða við fólki, sum raðfestir júst hetta. Støðan hjá Liz er óviss enn, og hon hevur støðugt pínu.

Vónandi fara læknakanningar at finna orsøkina til hetta, so okkurt kann gerast.

## *28. Mánadagur* — *Matt. 23.13-25*

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Hanna 16**

Tim er aftur í Filipsoyggjum og hevur higartil undirvíst tvær ferðir í naplud ættarbólkinum, har vit áður búðu. Koyring til og frá er krevjandi. Hann og onnur fara at boða evangeliið í bygdini Mepiang, ið er ein tíma koyring frá Naplud. Biðið, at Heilagi Andin skal virka í hjørtum teirra.

## *29. Týsdagur* — *Hos. 14.1-10*

**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 12, Noah Kristian 10**

Vit eru heima aftur í Chiang Mai. Nógvar broytingar eru í starvsfólkahópinum á The Well International, og vit bjóða nýggjum starvsfólkum at vera vælkomin. Biðið fyri teimum, sum tey laga seg til nýggja arbeiðið og verða partur av toyminum.



## GRØNLAND, Qaqortoq
## Marjun og Páll Poulsen



Í ár bað Familiecentret, ein sosialur stovnur hjá kommununi, ið hjálpir fólki við tørvi, um at brúka leguhúsini hjá Oqqiffik í fýra vikur. Hetta hevur skapt gott samband og umdømi, og vit hava kunnað kunngjørt evangeliið. Umframt børn og vaksin, so vístu fleiri leiðarar áhuga og takksemi fyri boðskapin. Vit læna leguhúsini út við ávísum treytum. Ein av fleiri er, at vit sleppa at hava eina andakt og sangløtu um kvøldarnar. Henda tænasta hevur verið í støðugari menning. Nøkur av fakfólkunum síggjast her. Hon uttast til høgru var sera góður tolkur – álvarsom, innlivandi og samkenslufull.

Útgevari KBS (Kristniboðssambandið)
Blaðnevnd Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest og Sigurð Ó. Vang.
Avgreiðsla Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057
Uppseting Grafikmaster, tel. 502022
Myndasavn info@grafikmaster.fo
Prent Føroyaprent, tel. 314555
Teldupostur prayerservicefo@gmail.com
Heimasíða www.kbs.fo
NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## 31. Hósdagur — Orðt. 12.1-28

**BÓKATÆNASTAN**
Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!

**The Veritas Forum**
***www.veritas.org***

The Veritas Forum varð stovnað í 1992 og hevur til endamáls at lyfta fram kristna boðskapin á universitetum kring heimin. Á heimasíðuni eru kjak, samrøður og sendingar, bæði sum video og podcast. Her møta vit úrmælingum sum John Lennox og Tim Keller, ið kjakast við t.d. gudloysingar og um aðrar heimsáskoðanir. Tilfarið er bæði læruríkt og til uppbygging.

Far inn á leinkjuna og vel tað, tú vilt hoyra ella síggja.




FORLAGIÐ LEIRKERIÐ

Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo